Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	30.09.2022
Mál nr.:	22/14741
Málsviðgjørt:	JEK
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	27. september 2022

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)
(Leingjan av tíðarskeiðnum fyri endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við keyp av orkuvinarligum motorakførum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 2. mai 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 3 c, stk. 1, 2. pkt. verður strikað.

2. § 3 c, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Í 2023 og 2024 verða í mesta lagi kr. 70.000 endurgoldnar, í 2025 verða í mesta lagi kr. 52.500 endurgoldnar, í 2026 verða í mesta lagi kr. 35.000 endurgoldnar, og í 2027 vera í mesta lagi kr. 17.500 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2028 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið."

3. Í § 3 c verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. 3 sett:
"Stk. 3. Fyri plug-in hybridakfør, PHEV verða í 2023 og 2024 í mesta lagi kr. 35.000 endurgoldnar. Í 2025 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið."
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 4.

4. § 3 c, stk. 3, sum verður § 3 c, stk. 4, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjald eftir hesi grein skal plug-in hybridakfarið verða skrásett í seinasta lagi 31. desember 2024, meðan el- ella vetnisakfarið skal verða skrásett í seinasta lagi 31. desember 2027."

§ 2

Stk. 1. § 1, nr. 2-4 koma í gildi 1. januar 2023.
Stk. 2. § 1, nr. 1 kemur í gildi 1. januar 2025.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Við uppskotinum verður afturberingin av meirvirðisgjaldi eftir løgtingslóg um meirvirðisgjald longd, men í broyttum líki. Afturberingin verður frá 2025 stigvíst lækkað við 25% árliga fyri el- og vetnisakfør, eins og afturberingin frá sama ári at rokna verður avmarkað til el- og vetnisakfør í samsvari við samtykta veðurlagspolitikkin.

Uppskotið er at síggja sum eitt av tveimum uppskotum, sbr. uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum leggja upp til eina stigvísa lækking av stuðlinum, sum verður veittur í sambandi við keyp av orkuvinarligum akførum.

Í samtykta veðurlagspolitikkinum verður mælt til fleiri átøk at skunda undir orkuskiftið í Føroyum. Sum heild verður støði tikið í teimum tilmælum og málum, sum veðurlagsnevndin hjá ST, Intergovernmental Panel on Climate Change, IPCC, hevur sett fyri at skerja samlaða heimsútlátið av vakstrarhúsgassi við 45 prosentum í 2030. IPCC mælir eisini staðiliga til, at heimsins lond ikki hava meira útlát í 2050 enn trø, plantur og hav kunnu upptaka. Skotbráið er lutfalsliga stutt og fyri at røkka hesum, er neyðugt við greiðum átøkum beinanvegin. Tað er við hesum tilmælum í huga, at ætlanin at leingja afturberingarskipanina skal lesast.

Verandi áseting um endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við keyp av orkuvinarligum motorakførum (el-, vetnis- og plug-in hybridakførum) eru tíðaravmarkaðar til 31. desember 2022 fyri endurrindan av í mesta lagi kr. 70.000 og 31. desember 2024 fyri endurrindan av í mesta lagi kr. 35.000.

Skipanin við endurrindan av meirvirðisgjaldi hevur nøkur ár á baki, men enn verður mett neyðugt at stuðla fólki fíggjarliga, soleiðis at valið lættari fellur á eina orkuvinarliga loysn. Galdandi áseting um meirvirðisgjaldsafturbering fevnir um el-, vetnis- og plug-in hybridakfør. Við uppskotinum verður ásetingin um afturbering av meirvirðisgjaldi avmarkað til el- og vetnisakfør at rokna frá 1. januar 2025 eins og afturberingin verður stigvíst lækkað fyri el og vetnisakfør við 25% um árið til hon í 2028 er burtur.

1.2. Galdandi lóggáva

Sambært galdandi lóggávu kann tann, sum keypir motorakfar, sum bert nýtir el ella brint til framdrátt, fáa meirvirðisgjaldið heilt ella partvíst endurrindað. Umframt áðurnevndu akfør er skipanin við endurrindan av meirvirðisgjaldi eisini galdandi fyri sonevnd plug-in hybridakfør, t.v.s. akfør, sum bæði hava ein elmotor og ein brennimotor. Motorarnir kunnu arbeiða saman ella hvør sær.

Fyri at fáa meirvirðisgjaldið endurgoldið skal motorakfarið vera skrásett í seinasta lagi 31. desember 2024.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at eggja persónum og fyritøkum til framhaldandi at gera íløgur í orkuvinarligar loysnir.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður skipanin við afturbering av meirvirðisgjaldi í sambandi við keyp av orkuvinarligum motorakførum broytt til einans at galda fyri el og vetnisakfør at rokna frá 1. januar 2025. Harnæst verður afturberingin fyri el- og vetnisakfør stigvíst lækkað við 25% um árið frá 2025 til 2027.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar.

Talan er í høvuðsheitum um at leingja tíðarskeiðið í sambandi við keyp av orkuvinarligum motorakførum.

Hóast uppskotið ikki formliga hevur verið til hoyringar, hevur Fíggjarmálaráðið samskift við TAKS um uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum

Inntøkurnar frá meirvirðisgjaldinum fara allar í landskassan. Tí ber landið kostnaðin, tá ið meirvirðisgjald verður afturrindað. Væntaði kostnaðurin av broytingini valdast, hvussu nógvir el-bilar verða seldir næstu árini.

TAKS hevur upplýst, at tað kostaði landskassanum um 6 mió. kr. í 2020 at endurrinda meirvirðisgjald í sambandi við el- og vetnisakfør. Í 2020 vóru um 130 nýggir el-bilar skrásettir. Í 2021 kostaði tað landskassanum um 23 mió. kr. at endurrinda meirvirðisgjald í sambandi við el-, vetnis- og plug-in hybridakfør. Frá 1. januar til og við 31. juli 2022 vórðu endurrindaðar áleið 19,2 mió. kr. í meirvirðisgjaldi í sambandi við el-, vetnis- og plug-in hybridakfør.

Akstovan upplýsir, at fakturavirðið í miðal er 250 til 300 tús. kr. á einum nýggjum el-bili. Akstovan upplýsir eisini, at í løtuni verða skrásettir um 500 nýggir el-bilar árliga. Umleið 600 nýggj hybridakfør (HEV) og um 200 nýggj plug-in hybridakfør verða skrásett árliga.

Hvør nýggjur el-bilur fær tí endurrindað 50 til 60 tús. kr. í miðal í meirvirðisgjaldi. Høvdu el-bilar rindað sama skrásetingargjald sum bensin- og diesel-bilar av fakturavirðinum, hevði hvør el-bilur rindað 150 til 200 tús. kr. í skrásetingargjaldi í miðal umframt meirvirðisgjald av fakturavirðinum.

Avgjaldsfrítøkan á el-bilum er tí kostnaðarmikil fyri landskassan. Hinvegin kunnu vit siga, at var eingin avgjaldsfrítøka á hesum akførum, høvdu el-bilar ikki verið kappingarførir við aðrar bilar, og tá hevði sera lítil søla verið av el-bilum. Í staðin høvdu verið seldir fleiri vanligir bensin- og dieselriknir bilar.

Kostnaðurin av at frítaka nýggjar el-bilar fyri skrásetingargjald sæst millum annað í, at inntøkan hjá landskassanum av skrásetingargjaldinum er lækkað úr um 186 mió. kr. í 2019 til mettar um 110 mió. kr. í 2022. Orsøkin er ikki bara sølan av nýggjum el-bilum, men eisini, at færri nýggir bilar verða skrásettir yvirhøvur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

TAKS hevur uppá fyrispurning upplýst, at tað fer umleið ½ ársverk til at umsita afturberingina av meirvirðisgjaldi í sambandi við el-, vetnis og plug-in hybridakfør. Talan er um handligt arbeiði.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna. Afturberingin er omanfyri tað, sum galdandi løgtingslóg ásetir. Harnæst verður tíðarskeiðið við afturbering longt við trimum árum fyri el- og vetnisakfør. Lægri avgjald ber í sær ein størri eftirspurning.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið, eftirsum orkuvinarlig akfør dálka minni.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Føroyar hava bundið seg til at fylgja Paris avtaluni um at minka útlátið av veðurlagsgassi. Við at stuðla einari grønari loysn til framdrátt av akførum minkar útlátið av CO_2.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1. **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2. **Evropiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
   Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at EMRS.

3. **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið er eitt avgjaldsuppskot, sum ber í sær lutvísa endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við keyp av orkuvinarligum motorakførum.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1
Sambært galdandi løgtingslóg er afturberingin galdandi fyri el- vetnis- og plug-in hybridakfør.

Sambært uppskotinum verður afturberingin at rokna frá 1. januar 2025 bert galdandi fyri el- og vetnisakfør.

Til § 1, nr. 2
Við uppskotinum verður skipanin við afturbering av meirvirðisgjaldi fyri el- og vetnisakfør longd við trimum árum, men í broyttum líki.

Afturberingin av meirvirðisgjaldi, sum er í ár er í mesta lagi kr. 70.000, lækkar at rokna frá 2025 við 25% um árið, til hon í 2028 er burtur.

Til § 1, nr. 3
Eftir uppskotinum lækkar afturberingin av meirvirðisgjaldi fyri plug-in hybridakfør niður í eina helvt í 2023. 1. januar 2025 verður meirvirðisgjald ikki afturborið í sambandi við keyp av plug-in hybridakfari.

Til § 1, nr. 4
Tað er ein fyritreyt fyri at fáa afturgoldið meirvirðisgjald eftir § 3 c í meirvirðisgjaldslógini, at akfarið er skrásett innan eina ávísa freist. Fyri plug-in hybridakfør er freistin 31. desember 2024, meðan freistin fyri el- ella vetnisakfør er 31. desember 2027.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 30. september 2022

Uni Rasmussen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur